# – Eg livi fyri tónleikin

**- Tónleikurin er alt fyri meg. Hann ger, at eg eri á lívi - at eg livi. At vera tónleikin fyriuttan er tað sama sum at leggja seg at doyggja sigur Sigrið Rasmussen, sum gongur á tónleikaskúla í London. Hon heldur Føroyar goyma hópin á tónleikaratalentum. Spurningurin er bara at uppdaga tey**

TÓNLEIKUR
*Jan Müller*


*Sigrið Rasmussen her saman við Teiti Lassen, tá tey sungu seg inn í hjørtuni á føroyingum á samkomu í London herfyri*
*Mynd Jan Müller*

Hóast smáar eiga Føroyar nógvar góðar tónleikarar og tónlistafólk. Eitt av teimum er 28 ára gamla Sigrið Rasmussen úr Havn. Hon byrjaði fyri hálvum ári síðani á einum av teimum kendu tónleikaskúlunum í London, "London College of Music", á "Tahmes Valley University", ið hevur eina serliga sanglinju, ið einans 24 næmingar sleppa inn á. Hon lesur til Bachelor of Popular Music Preformance. Útbúgvingin tekur trý ár.

### Stórtrívist

– Tað gongur faktiskt øgiliga væl. Eg stórtrívist. Tað er sera áhugavert at vera her í London sigur hon við Sosialin, sum hitti hana á føroyakvøldinum í London herfyri. Har sang hon saman við einum øðrum føroyskum tónlistafólki, Teiti Lassen.

Tað er so ikki ein og hvør skúli heldur, har Sigrið er sloppin at menna og útbúgva seg innan tónlistina, sum er alt fyri hana. 200 næmingar úr allari verðini sleppa inn á skúlan og var Sigrið einasti føroyingur teirra millum. Hon hevur valt vokallinjuna innan sang og teknikk, sum er rættiliga nýggj har á skúlanum.

Men hví London?
- London er staðið, um tú vil hava eina góða útbúgving innan tónleik. Slíkur skúli sum eg gangi á finst bert í London og í USA.

Sigrið, sum eitt skifti var í Noregi og har var við í fleiri tónlistatiltøkum, dámar væl umhvørvið í bretska høvuðsstaðnum.


*Sigrið Rasmussen: –Vit eiga mong fjald tónleikatalent í Føroyum*

### Framtíðin

Men hvat vil hon so brúka hesa útbúgvingina til, tá hon er liðug um knapp trý ár!

- Tað verður so upp til mín og støðuna tá. Tú kanst vera artistur og tú kanst undirvísa. Tú kanst koma víða við slíkari útbúgving, so vit fáa at síggja.

Men hvussu eydnaðist tað so henni at sleppa inn á skúlan?

- Eg haldi meg hava upplivað og lært nógv á tónleikaøkinum. So eg skuldi havt góðar royndir og barlast at koma á skúlan.

Sigrið Rasmussen sigur, at hennara mál er at gerast ein betri musikari og sangari og at kunna læra onnur. Tú kanst fara út í verðina og fáa nýggjar og fleiri royndir, og tú kanst fara heim eftir lokna útbúgving at læra føroyingar nakað um tónleik.

Tað hon veit um er eingin føroyingur, sum fær útbúgving innan tað hon nevnir popular music, sum annars er ein tónleikagrein, ið er nogv frammi í dag og sum hon heldur føroyingar kunnu fáa nakað gott burtur úr velja teir hesa grein.

### Tónleikurin alt

Tey sum hava hoyrt yndisligu og vøkru songrøddina hjá Sigrið ivast ikki í, at okkurt gott fer at spyrjast burtur úr henni. Og hon krógvar so heldur ikki, at tónleikurin er eitt og alt fyri hana. - Tónleikurin er alt fyri meg. Hann ger, at eg eri á lívi - at eg livi. At vera tónleikin fyriuttan er tað sama sum at leggja seg at doyggja.

Sigrið Rasmussen vónar, at hon ein dag kann koma heimaftur og vera við til at menna tónleikin og tónleikalívið í Føroyum. Hon heldur nevniliga, at tað eru mong fjald og ikki uppdagað talent í Føroyum, sum mugu finnast og haldast til.
- Tað eru mong, sum hava talent sum tónleikarar men sum ikki vita av tí. Man kann fáa tey fram, fáa tey at hugsa, at tey kunnu gera nakað við tónleikin longu nú, tá tey eru ung.

Nú so nógv verður tosað um týdningin, sum fótbólturin hevur fyri Føroyar heldur Sigrið, at vit eisini við tónleikinum hava møguleika at gera okkum galdandi. – Tónleikurin hevur stóran týdning í flestu samfeløgum, og eg ivist ikki í, at hann kann fáa nógv størri týdning fyri Føroyar og føroyingar í framtíðini, um vit leggja nakað í hann.

Sjálv heldur Sigrið tað vera sera hugaligt at hoyra um tey mongu ungu, sum koma seg fram á tónleikapallinum, eitt nú Eivør, Teitur, Guðrun og Brandur fyri bert at tríva í nøkur í rúgvuni.

- Eg eri sera spent um, hvussu tað fer at hilnast hjá Teiti, nú hann fer út í heimin við nýggjari fløgu. Eg havi kent hann leingi og hann fær mín fulla stuðul og ynski eg honum góða eydnu sigur ein fryntlig og fegin Sigrið Rasmussen, sum nú heldur fram við tónleikalesnaði sínum í London.

#### Fakta um Sigrið

Hon hevur nógvar royndir og eisini útbúgving/skeið á tónleikaøkinum.Vit hava hugt í hennara CV:

<u>Skúli og útbúgving</u>
Graduate at Sinsen College, Oslo, Norway 2001
Bærum Music School, classical violin, Oslo, Norway 1995-1998
MGK, Music Basic Course, Denmark 1994-1995
5th Grade at the Associated Board of the Royal School of Music, violin, Faroes 1994
Tórshavn Musical School, Faroe Islands 1983-1993
Still getting private lessons in Violin

<u>Tónleikaroyndir</u>
Played violin since 1983 -
Played some piano
Ebenezer Choir, Faroe Islands 1988-1994
1st Violin at the Faroese Symphony Orchestra 1989 –
Musical Teacher at Tórshavn Musical School in Classical violin, Faroe Islands 1993-1994
Solo Church Concerts in Norway 1998-2000
Norwegian Gospel Voices, participated in records and with solos 1996-2001
Solo and Duet at the Gospel Convention in Kansas City, USA 1999
Guest Soloist at the Tórshavn Jazz Festival 1998
Member of Grace (Pop Group) 1998-1999
Live Concerts with Grace in:
Around Norway, Sweden, Monaco, Svalbard and Austria (Winter OL in Ramsau)
Private song lessons 1998-2001
Studio Vocal Recordings in the Faroes, Norway and Sweden 1994-
Main Soloist at Mixed Well Known Musicals, Oslo, Norway 1996
Soloist at the Christmas Musical, Oslo, Norway 2001
- With more…

<u>Skeið</u>
Various courses in artist appearances 1997-1998
Various courses in media appearances 1997-1998
Violin Courses, private, Wil, Switzerland 1994

(Her restar so í seinastu árini)



# Harðskapur avmarkar børn sálarliga

**Finnur Helmsdal, sum er løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, sosialráðgevi og leiðari fyri Barnaheimið, sigur, at harðskapur avmarkar børn sálarliga. – Eitt tað mest niðurgerandi tú kanst gera ímóti einum barni er at brúka tína stødd og vekt ímóti tí, sigur løgtingsmaðurin**

HARÐSKAPUR
*Ingrid Bjarnastein*


*Børnini eru nú komin á breddan. Javnaðarflokkurin hevur lagt uppskot fram á tingi um, at tað skal ikki vera loyvi at revsa børn likamliga í Føroyum*
*Tilvildarlig mynd*

Uppskotið hevur ógvuliga stórt signalvirði, og tað er týdningarmikið hjá tinginum at vísa, at vit sum land góðtaka ikki harðskap ímóti børnum. Hetta heldur Finnur Helmsdal, sum er løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, sosialráðgevi og leiðari fyri Barnaheimið.

– Likamligur harðskapur er ikki bara likamlig revsing. Tað er eisini ein sálarlig revsing. Tá ein stórur og sterkur persónur slær eitt barn, so snýr hetta seg eisini um sálarligan ágang. Eitt tað mest niðurgerandi tú kanst gera ímóti einum barni er, at tú nýtir tína stødd og vekt ímóti tí, sigur Finnur Helmsdal.

Hann sigur, at tað snýr seg um at vísa virðing og kærleika ímóti barninum, og føroyingar eiga ikki at tilskila sær rættin til at tulka, hvat hetta merkir. Kærleiki er ikki ein brestur í afturpartin, men heldur orð, sum kunnu menna børnini sálarliga, heldur Finnur Helmsdal.

Finnur Helsmdal tekur fult undir við uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum um, at tað skal gerast ólógligt likamliga at revsa børn.

– Harðskapur avmarkar børn sálarliga. Tað er avgerandi fyri eitt barn, hvat viðføri tað fær víðari, og her er tað sálarliga ógvuliga týdningarmikið.

### Taparin

– Harðskapur er eitt armóðstekin. Hendrik Old segði á tingi mikudagin, at tað er tann, sum slær, sum hevur tapt, men tað er sanniliga eisini tann, sum verður sligin, sum hevur tapt, greiðir Finnur Helmsdal frá.

Orsøkirnar kunnu vera fleiri. Jenis av Rana, tingmaður, segði, at orsøkin var sum oftast rúsdrekka, men heldur Finnur Helmsdal, at raðfestingin í dagligdegnum hevur eisini nógv at siga.

– Hvussu raðfesta vit børnini í gerandisdegnum? Tað snýr seg um, í hvønn mun vit eru saman við børnunum, og hvat vit gera saman við teimum. Orsøkin er í teimum dagligu viðurskiftunum, og tað er har vit skulu fara inn, sigur løgtingsmaðurin.

Finnur Helmsdal mælti mikudagin rættarnevndini til, at tingið skal senda eitt signal út.

– Vit eiga at vísa umheiminum, at Føroyar taka ikki undir við, at tað er rætt at sláa børn, segði Finnur Helmsdal at enda.

Katrin Dahl Jakobsen:

# Snýr seg um at flyta mørk

**Katrin Dahl Jakobsen hevur vegna Javnaðarflokkin lagt uppskot fram á tingið um, at foreldur ikki longur skulu sleppa at revsa síni børn likamliga**

HARÐSKAPUR
*Ingrid Bjarnastein*



– Allir flokkar hava uttan iva í síni virkisskrá ein part, sum snýr seg um børn. Og vit hava nú tosa um hetta at føroyingar framvegis kunnu revsa síni børn. Tað er bert hesin bólkurin í samfelagnum, sum ikki er tryggjaður, tí revsirætturin hongur við yvirfyri teimum, sigur Katrin Dahl Jakobsen, sum vegna Javnaðarflokkin hevur lagt uppskot fram á tingi um, at foreldur ikki longur skulu sleppa at revsa síni børn likamliga.

Javnaðarflokkurin metir, at tíðin er nú komin til tað, at vit í Føroyum vísa umheiminum, at vit ganga ikki inn fyri harðskapi ímóti børnum. Í Íslandi fer eitt líknandi orðaskifti fram á Altinginum, og í øllum Norðanlondum er tað forboðið at revsa síni børn.

– Uppskotið snýr seg yvirhøvur um likamliga revsing. Vit skulu fortelja okkum sjálvum og umheiminum, at vit góðtaka ikki harðskap, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Hon heldur, at virkningurin av hesi lógini fer at hava við sær, at tað fer at minka um harðskap, har harðskapur verður framdur.

– Fólk hefta seg við praktiseringina av hesi lógini. Um tað skal vera loyvi at geva barninum eina oyrafiku ella ikki. Ella um tú nú tekur í eitt barn, verður tú so meldaður. Men tað hevur víst seg í Danmark, at fólk melda ikki tilburðir av hesum slagnum, greiðir Katrin Dahl Jakobsen frá.

Hon sigur, at við lógini skalt tú flyta mørk, tá tað snýr seg um hugburð. Nýggja ættarliðið góðtekur minni og minni harðskap.

– Okkara uppgáva er at siga, at vit góðtaka ikki harðskap, tí børn taka hetta við sær út í lívið, sigur Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin at enda.

# Hvat sigur Bíblian um pengar

*Fríðtór Debes hevur júst útgivið nýggja bók við heitinum »Hvat sigur Bíblian um pengar«*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Nýggj bók er nú útkomin. Hon hevur heitið »Hvat sigur Bíblian um pengar?«, og er tað Fríðtór Debes, sum hevur skrivað hana**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Fríðtór Debes hevur júst útgivið eina nýggja bók. Hon eitur »Hvat sigur Bíblian um pengar«. Hetta er fimta bókin hjá rithøvundinum.

Bókin er 163 blaðsíður og kostar 140 krónur. Hon fæst í flest øllum bókhandlum kring landið. Hestprent hevur staðið fyri prenti og umbróting.

Sum heitið á bókini sigur, so er bókin um, hvat Bíblian sigur um evnið pengar. Vit vita, at pengar spæla ein nógv størri leiklut enn vit mangan hugsa. Alt í lívi okkara snýr seg um pengar. Hetta merkir tó ikki, at vit skulu lata pengar hava vald á okkum. Ei heldur eiga vit at vera gírig ella næstin, men heldur fylgja teimum leiðreglum Guðs Orð býður okkum.

Bíblian hevur nógv at siga um pengar. Eisini postivt. Eini 20 prosent av allari Bíbliuni umtala pengar í einum ella øðrum líki.

Grundin til henda bókin er skrivað er fyri at hjálpa teimum, sum veruliga vilja vita, hvat Bíblian sigur um hetta stóra evnið.